


ísinum hósdagin vórðu vinningarnir í stóru jólakalendarakappingini í Sosialinum trektir

Mynd: álvur Haraldsen

# rin í gávuhýri

ferðir um árið. Kent Christensen sigur, at um fólk vilja fáa hugskot úr seianstu skránni - og tey ikki hava hana longur - so fæst hon á ferðaskrivstovunum - og har eru nógv góð hugskot at fáa, sigur hann.

- Hetta við at selja ferðaseðlar fyri serligan prís í einum ávísum tíðarskeiði, er nakað, sum fólk eiga at venja seg til. Tí um tey leggja ferðina til rættis í góðari tíð, so ber til at fáa sera góð tilboð, sigur Kent Christensen.

Hann sigur, at síðst í mars kemur eitt nýtt ÚT Í HEIM við nýggjum ferðamálum: Ålborg, London og Billund.

- Har verða eisini nógv góð hugskot til ferðir, um tað skal vera ein romantisk ferð, familjuferð ella ein handilsferð - so eru nógv góð hugskot at heinta har, sigur Kent Christensen.



*Erling í Liða, marknaðarstjóri hjá Føroya Shell, trekti hepna vinnaran av teimum 10.000 kr í olju*

*Mynd: álvur Haraldsen*

# 10.000 kr í olju til Trongisvágs

Erling í Liða, marknaðarstjóri hjá Føroya Shell trekti vinnaran av teimum 10.000 kr í olju. Hepni vinnarin var Johan Michael Strøm í Trongisvági.

- Tað er sjálvandi altíð stuttligt at kunna »hita« fólk við einum slíkum vinningi, sigur Erling í Liða, sum vísir á, at 10.000 kr í olju svarar til áleið átta mánaðir í olju hjá einum miðal húsarhaldi.

# Faxe í framgongd

Tað er neyvan at taka munnin ov fullan, at ein av størstu varðunum hjá klaksvíkingum er lokala øl- og sodavatns-framleiðslan.

Tí var tað kanska eitt sindur stuttligt, at vinningurin við teimum 10 sodavatnskassunum frá Faxe skuldi fara til Klaksvík, har Laila M. Hjelm hevði sent inn seðil til jólakappingina. Men tað tóktust sølufólkini hjá Poul Michelsen heilsølu nú ikki at hava stórvegis ímóti.

- Klaksvík er heilt víst ein marknaður, har vit eisini hava merkt framgongd. Sum heild hevur sølukurvan hjá okkum verið positiv, síðani vit í 2002 yvirtóku umboðið upp á sodavatnið frá Eysturoyar Heilsølu, sigur Sjúrður Ludvig, sum saman við Finni Hansson stendur fyri søluni av Faxe, Pepsi, Miranda, 7-up og Egekilde vatni.

Skemtiliga varð tá ofta tikið fyri, at Faxe varð bara drukkið í Eysturoynni, men tann myndin er væl og virðiliga broytt síðani. Og tá samlaða sølan av leskidrykkum samstundis er follin, heldur Sjúrður, at tey hava alla orsøk at vera nøgd.

- Og so rokna vit við, at sølan veksur heilt nógv, tá emballagulógin verður broytt. Sum er, so kunnu vit ikki selja kelduvatn uttan kolsýru, tí hetta verður ikki tappað í endurnýtslufløskur. Tann veruleikin verður væntandi broyttur 1. mai, og vit ivast onga løtu í, at vit tá fáa ein stóran marknað afturat, sigur Sjúrður.